# 100 ár síðan Mjólkaforsýningin varð stovnað

**Í hesum døgum eru 100 ár liðin síðan eitt søguligt vinnuligt átak í Føroyum. Nevniliga stovningin av mjólkaforsýningini. Hetta merkti eitt frambrot í ferðamannasigling í Føroyum. Frammanundan var tað bert Smiril, sum sigldi, og var henda rutan byrjað í 1896. Nú fekst eisini ruta inn á Skálafjørðin og norður eftir Sundalagnum. Samstundis varð skipað fyri at skaffa havnarfólki mjólk og bóndrunum størri møguleikar fyri mjólkaframleiðslu.**
**Fyri nøkrum árum síðan hevði FF-blaðið fleiri greinir um hetta virksemi, har høvuðskeldurnar vóru Álvur Danielsen og Petur Háberg. Í samband við hesi 100 árini er tað hóskandi at tríva eitt sindur í hesa søgu**



*Ruth skapti søgu fyri 100 árum síðan*


Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Í Havn høvdu nakrir menn eina tíð arbeitt við at seta á stovn eina mjólkarsølu til tess at bøta um mjólkarneyðina í Havn.

Tann fyrsti, sum kom við uppskoti um eina mjólkarsølu í Havn var Hilmar J. Fridericia, sum í árunum 1903-1907 var fyrsti kommunulækni í Havn. Hann dugdi betri enn aðrir at skilja, hvussu skaðilig mjólkarneyðin var fyri fólkaheilsuna, og hann legði doyin á at fáa meira mjólk til Havnar. Hann vendi sær til ymsar stovnar í Danmark, og av hansara ávum kom Landbrugsholdnings selskabets mjólkarvirkisráðgevi G.O.F. Elbrecht higar at leggja monnum lag á.

Undangongumenninir at fáa sett á stovn mjólkarvirki og rutusigling vóru: Napoleon Andreasen í Dali, C. Christiansen, bankastjóri og Valdemar Lützen. Valdemar var formaður í nevndini í heili 43 ár. Tað skal eisini nevnast, at hann var ein tann fremsti stuðulin at byggja sjómansheim í Havn.

Teimum kravdist ein partapening upp á kr. 22.500. Teir skriva so til aðalstjórnina fyri postverkið í Keypmannahavn og greiða gjølliga frá, hvat veldugt framstig tað vildi verið fyri postflutningin, um ein bátur hvønn dag sigldi til tær ymisku bygdirnar og aftur til Havnar sama dag. Tí heita teir á postverkið um at fáa loyvi at hava postflutningin um hendi, og fyri hetta tørvar teimum minst kr. 4.000 fyri um árið og umframt tað eitt lán uppá kr. 6.000. Tað er einki at ivast í, at tað mundi vera Christian Bærentsen, tí føroyska amtmanninum 1897-1911, og læknanum Fridericia fyri at takka, at hetta gekk so væl.



*Her byrjaði virksemið á landi. Arnesminde í Bringsnagøtu*

## Neyðugt við báti

Samstundis, sum mjólkarsølan varð sett á stovn, sóu teir, at tað fór at vera neyðugt at hava ein bát, ið dagliga kundi sigla út á bygdirnar eftir mjólk. Tað var eyðsæð, at ein tílík fyritøka vildi vera til gagns, ikki bert fyri Havnina, men eisini fyri neytahaldið úti á bygdunum. Hetta kom eisini at hava stóran týdning fyri flutning av fólki, vørum og posti millum bygdirnar - fyri fyrst norðanfjørðs.

Alt hetta gekk so mikið væl í hond, at felagið varð stovnað 5. mars 1908, og longu 1. apríl, í gjár fyri 100 árum síðani, byrjaðu teir at sigla við einum motorbáti, ið æt "Dan", sum teir leigaðu frá Jensen smiði.

Fyrireikararnir komu í samband við Petur Jensen, og fingu teir mong góð ráð frá honum. Sum fulllærdur meiaristur lovaði hann at dugna teimum sum best.

Í 1909 kom Petur Jensen upp at taka við leiðsluni av mjólkaforsýningini. Fyri hetta fekk hann kr. 125 um mánaðin, og sonurin Carl, sum eisini kom uppí virksemið, fekk kr. 60 í mánaðarløn. Carl var eisini í aðrar mátar ein álitismaður. Til dømis var hann í mong ár limur í líkninganevndini í Havn. Hann var kendur fyri at vera skemtingarsamur og at duga væl við fólki.

Maskinurnar komu, og mjólkarvirkið byrjaði í september mánaði sama ár. Peter Jensen var annars komin til Føroyar at agitera fyri fráhaldssakini, og hann gjørdist ein tann fremsti leiðarin hjá føroysku fráhaldsrørsluni. Hann og konan Vilhelmine eru grivin í gamla kirkjugarði, og tá vit koma til søguna um tey í okkara røð "Hendur ið sleptu", fara vit at umrøða hansara og teirra arbeiði á hesum øki.

## Ruth - ein stórhending

Stóra gjøgnumbrotið hendi við keypinum av Ruth. Báturin varð bygdur á Rosenberg Mekaniske Verksted í 1906. Hann var bygginummar 20 hjá hesi skipasmiðjuni og varð bygdur til B. P. Husebø í Stavanger. Báturin varð latin eigaranum 10. september 1906. Husebø var bæði eigari og skipari, og hann átti Ruth, sum hon eisini kallaðist tá, so leingi hon var í Noreg. Ruth varð bygdur sum sleipibátur, men varð í 1908 skrásettur sum ferðamannaskip við loyvi til 70 ferðafólk í vardum farvatni. Báturin sigldi tó ikki við